# Dreymurin er at hitta Frakland og Holland

**At kappingin um plássini er størri, enn hon hevur verið, ber við sær, at tað eru nógvir spælarar, sum stríðast um plássini, og serliga hjá einum er portrið trongt**

**Jóannes Hansen**
*joannes@sosialurin.fo*

Tað eru ikki smávegis avbjóðingar, sum bíða landsliðnum. Í summar skulu føroyingar spæla í Sveis ímóti Hollandi, og í heyst eru Sveis, Kypros og Frakland á skránni. Hóast talan er um vinardyst ímóti Hollandi, sum fyrireikar seg til EM endaspælið, so kennist spenningurin serliga stórur millum landsliðsspælararnar, tá ið tað verður tosað um hollendsku og fronsku heimsstjørnurnar.

Tá ið landsliðið verður úttikið, eru tað nakrir spælarar í heimligu kappingini, sum eru púra tryggir, um teir ikki eru skaðaplágaðir. Tað valdast sjálvandi um dagsformin, men millum hesar eru málverjarnir, Jákup Mikkelsen og Jens Martin Knudsen, Pól Thorsteinsson, Óli Johannesen, Súni Olsen, Rógvi Jacobsen og John Petersen.

Aðrir eru ikki vísir í, um tað fer at verða pláss fyri teimum. Men teir vóna at verða boðsendir, og úttøkurnar seinastu ferðirnar hava givið onkrum teirra ábendingar um, at møguleikarnir eru góðir. Ein av hesum er Atli Danielsen úr KÍ sum í fjør spældi tríggjar ferðir á landsliðnum, og sum var við á venjingarleguni í Spania fyrr í ár.

Á KÍ liðnum er hann nýggjur liðformaður, og í fleiri av venjingardystunum higartil í ár hevur hann verið framrættaður miðvallari.

Hóast hann í felagnum tykist vera vorðin ein av lyklaspælarunum, so roknar Atli Danielsen seg ikki sum tryggan millum teirra, ið fara at fáa boð, tá ið Nistelroy og Henry fara at vera mótstøðumenninir, ið skulu temjast.

– Eg var við fleiri ferðir í fjør. Vit eru fleiri í mínum aldursbólki, sum hava verið við seinastu ferðirnar. Jón Rói Jacobsen, Hjalgrím Elttør og eg sjálvur eru frá 1983. Jann Ingi Petersen er frá 1984, og Ingi Højsted og Símun Samuelsen eru frá 1985. Tað verður neyvan pláss fyri okkum øllum í senn. Dagsformurin fer at gera av, hvørjir fara at fáa boð, so tað er ikki annað at gera enn at dríva á í heimligu kappingunum.

Á landsliðnum hevur Atli verið miðverji og miðvallari. Hann hevur ikki enn á landsliðnum røkt leiklutin, sum hann nú hevur fingið á KÍ liðnum.

*Roknar tú við at gerast framrættaður miðvallari á landsliðnum?*

– Soleiðis hugsi eg ikki. Nú arbeiða vit í KÍ við at fyrireika okkum so væl til kappingina, sum tað ber til. Um tað fer at ganga hampuliga, so økist møguleikin fyri at fáa landsliðsboð. Eg hevði avgjørt einki havt ímóti at fingið boð til dystin ímóti Hollandi í summar. Men hetta er ikki nakað, sum eg sjálvur geri av. Tað valdast um, hvussu tað fer at hilnast í heimligu kappingini.

*Hvar er títt pláss á landsliðnum?*

– Tað ger venjarin av. Mær dámar væl nýggja leiklutin á KÍ liðnum. Men eg havi ikki kenslu av, at tað higartil hevur verið á so framrættaðum plássi, at landsliðsvenjarin hevur ætlað at givið mær møguleikan. Tá ið vit spældu ímóti Luksemborg í Spania, vóru Pól Thorsteinsson og eg miðverjar. Eg var stak væl nøgdur við tann dystin, og eg gangi út frá, at um eg fái landsliðsboð næstu ferð, so verður tað fyrst og fremst við meiri verjukendum leikluti fyri eyga. Tað er eingin trupulleiki. Eg verði væl nøgdur, um teir fara at senda boð eftir mær. Tað verður ikki á hvørjum degi, at vit fáa møguleikan at standa andlit til andlit við heimsstjørnur sum tær hollendsku og fronsku, heldur Atli Danielsen.

## Trongt portur

Atli Danielsen telist millum ungu spælararnar, ið eiga framtíðina á landsliðnum fyri sær. Hjá øðrum marginal spælarum kann tað tykjast sum um, at tíðarskeiðið á landsliðnum verður meiri avmarkað.

Ein teirra, sum stríðst fyri landsliðssessi, er HB málverjin, Bárður Johannesen. Hann var fyrstu ferð á landsliðnum ímóti Luksemborg. Um hann fer at fáa møguleikan aftur seinni í ár, valdast bæði um, hvussu hann fer at standa seg í HB málinum, og hvussu kappingarneytarnir, Jákup Mikkelsen og Jens Martin Knudsen, fara at vera fyri.

Undir venjing mitt í mars breyt Bárður Johannesen beinið. Tað hevði við sær, at hann ikki fekk vant í einar tríggjar vikur ella har á leið. Hvussu ella um hetta fer at ávirka avrikini, fer framtíðin at vísa. Bárður Johannesen er tredivu ára gamalur. Ofta hevur tað víst seg, at málverjar eiga fleiri góð ár á, tá ið teir eru í hesum aldrinum. Góð dømi um hetta eru Jákup Mikkelsen, sum er 33, og ikki minst Jens Martin Knudsen, sum verður 37 11. juni.

Vegurin hjá Bárði Johannesen í landsliðsmálið gongur upp um teir báðar veteranarnar. Tí kann ikki sigast annað, enn at HB málverjin skal ígjøgnum trengri portur í landsliðsmálið, enn nakar annar av hinum monnunum, sum stríðast fyri at sleppa upp í part á landsliðnum, skulu.



*Atli Danielsen telist millum ungu spælararnar, ið eiga framtíðina á landsliðnum fyri sær*

*Myndi: Álvur Haraldsen*












